# Skal tað almenna bjargað Smyril Line?

Fakfeløgini heita á løgting og landsstýrið um at ansa sær sera væl, áðrenn avgjørt verður at bjarga eini privatari vinnufyritøku sum Smyril Line.

Tað eru nakrir grundleggjandi spurningar, sum svarast mugu, áðrenn tað almenna fer inn og loftar einum felagi.

Spurnartekin má setast við, hví verandi partaeigarar ikki lata pening í felagið, um tað er ein so góð íløga at seta pening í Smyril Line, sum ført er fram? Hvat við marknaðarkreftunum? Kunna onnur yvirtaka Smyril Line?

Hevur Smyril Line so grundleggjandi týdning fyri samfelagið, og ber tað ikki til hjá øðrum enn tí almenna at lofta Smyril Line? Hvat við kappingarneytunum á økinum, skulu hini flutningsfeløgini eisini hava stuðul um tey ikki standa seg?

Hvat við øðrum vinnuvirksemi? Er ein møgulig loftan av Smyril Line bert byrjanin til eina røð av stuðli úr almenna kassanum, sum vit øll rinda til?

Steðga samfelagsuppgávur upp, um Smyril Line ikki verður bjargaður av tí almenna? Missir samfelagið virði, og hvørji virði?

Fakfeløgini vilja eisini minna á, at tað er peningurin hjá borgaranum – Palleba og Marsonnu – sum brúktur verður – hetta er peningur úr sama kassa, sum eisini skal rinda fyri sjúkrahúsverkið, skúlaverkið og almennaverkið.

Kann tað verjast at nýta skattakrónur borgarans til at bjarga privatum fyritakssemi?

Spurningarnir eru nógvir, men higartil hava svarini frá almennu myndugleikunum og høvuðspersónunum í Smyril Line verið alt ov fá til at tað almenna treytaleyst kann lofta felagnum.

Almanna- og heilsurøktarafelagið

Felagið Føroyskir Sjúlrarøktarfrøðingar

Føroya Arbeiðarafelag

Føroya Fiskimannafelag

Føroya Handverkarafelag

Føroya Pedagogfelag

Havnar Arbeiðskvinnufelag

Heilsuhjálparafelag Føroya

Landsfelag Handverkaranna

Starvsmannafelagið